# Sigmund Andreasen á fløgu




FLØGUÚTGÁVA

Tann fyri nøkrum árum síðani so kendi skiparin, ið nærmast sat fangi á oynni Reuninon, Sigmund Andreasen, er í hesum døgum fløguaktuellur við »Himlinum mót«

Tað er Sigmundur Andreasen sjálvur, ið hevur skrivað allar sangirnar á fløguni, ið eru trettan í tali. Allir hava andaligt innihald, og tónleikurin er country. Lagt til rættis hevur Torkil Mørkøre, og fløgan er upptikin í Tmusic.

# Ringanna Harri á føroyskum

BÓKAÚTGÁVA




Almenn framløga av Ringanna Harra í Bókasøluni í SMS týsdagin tann 16. desember kl. 10.

Nú kemur Ringanna Harri, besta bók, sum komin er út í 20. øld, eisini út á føroyskum.

Henda bók er í veruleikanum eitt framhald av Hobbanum, sum John Ronald Reul Tolkien skrivaði í 1937. Ringanna Harri kom út í trimum bindum, tað fyrsta kom í1954 og hini bæði í 1955. Bókin fekk beinanvegin góð ummæli. Hon varð lisin um allan heim, og er týdd til nógv tungumál.

Tann sum hevur týtt bókina til føroyskt er Axel Tórgarð. Meðan hann var prestur í Kvívík kom ein dagin ein amerikumaður og bað hann lesa Hobban, og hann týddi hana beina vegin til føroyskt og las hana upp í útvarpinum. Í 1990 kom bókin út á føroyskum, men leingi himpraðist Axel fyri at fara undir ta avbjóðing at týða eina so stóra bók sum Ringanna Harra til føroyskt. 1500 blaðsíður er ikki sum at siga tað.

Men í fjør fór hann alíkavæl undir hetta verk, og hóast allar vansar hevur hann nú týtt tann fyrsta partin eins og allan annan part og tað mesta av triðja parti. Hetta hendir samstundis sum triði partur av filminum hevur frumsýning um allan heim, eisini í Havnar Bio.

Bókin er myndskrýdd av Tróndi Paturssyni, og hevur hann valt eina kápumynd sum bindur verkið saman við fornsøgum okkara. Hetta er ikki av tilvild, tí Tolkien var kønur í okkara gamla máli, og nógv av nøvnunum í bókini eru fornføroysk. Við at fáa bóokina út á føroyskum er hon tí í veruleikanum komin út á móðurmáli sínum!

Bókin er innbundin, 460 blaðsíður og kostar 350 kr.

Í sambandi við útgávuna verður eitt serligt jólatilboð, soleiðis at henda bókin bert kostar 300 kr og Hobbin 200 kr. Forlagið er Stiðin.

# SEV-ætlanin ov lág

FØROYA NÁTTÚRU- OG UMHVØRVIS-VERNDARFELAG

Seinast í november kom fram at SEV fór at hava umboðsnevndarfund 12. desember 2003 um framhald av vatnorkuútbyggingini í Eysturoy.

Ein so stórtøkin verkætlan má umhugsast væl og virðiliga og ikki hurlast ígjøgnum.

Eiði 2 ætlanin er at taka alt vatn av vestursíðuni á sunnaru helvt á Eysturoynni í ca. 200 m. hædd norður til Eiuðisverkið.

Hetta er mett at geva 17 mill. K.W.T. um árið, og kostnaðurin mettur til ca. 150 mill. kr. Vit meta at Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag (FNU) hevur skyltu at mæla til at henda ætlan ikki verður gjørd í skundi.

Er bráðneyðugt at økja el-framleiðsluna, klára 6 vindmyllur í Vestmanna at framleiða líka nógv, og íløgan er ca. 30 mill. kr.

Verður Eiði 2 útbygt, verður farið víðari við Eiði 4 og vatnið á vestursíðuni á Skálafjørðinum í 200 m. hædd endar eisini í Eiðisflógva.

Neyðugt er at endurskoða ætlanina og hyggja at útrokningunum frá felagnum Berdal. Tær vísa klárt at útbygging í ca. 300 m. hædd gevur nógv meiri og bíligri orku enn útbyggingin í 150 m. hædd.

Nýggjari regnmátingar vísa eisini at tað regnar nógv meira í erva, enn áður mett.

Eiðisætlanin kundi givið nærum dupult so nógva orku, um lurtað varð eftir serfrøðini.

Útbyggingin í 300 m. hædd krevur eina eyka turbinu onkustaðni.

Verður turbinan við Skálafjørðin, kann vatntrupulleikin við Skálafjørðin verða loystur og munandi meira vatn kemur í fjørðin, ið vistfrøðiliga er illa fyri.

FNU roynir at verja umhvørvið.

Útbyggingin í 300 m. hædd er umhvørvisliga nógv tann frægara loysnin og samsvarar eisini betri við Rio-sáttmálan um burðardygga menning.

Sum brúkarar mega vit krevja at fáa sum mest fyri íløgurnar og at verkætlanin er so umhvørvisvinarlig sum gjørligt.

# Sangkórið í Ebenezer á nýggjari fløgu

**Nýggj fløga við Ebenezerkórinum er komin í handlarnar. Á fløguni, sum ber heitið "Gud og eina Gud" eru 17 sangir. Ebenezerkórið syngur 9, meðan Triple Trio, Tey á Váli og Dupultkvartettin syngja tveir hvør og Dupultkvartettin saman við Triple Trio syngja tveir. Allir sangirnir eru á føroyskum**



FLØGUÚTGÁVA

Á fløguhúsanum stendur at lesa um kórið:

"Síðani Ebenezerkórið byrjaði í 1937, hevur aðalmálið verið: At bera gleðiboðskapin um Jesus Kristus fram í sangi og tónleiki. Kórið hevur sítt heim í samkomuni í Ebenezer í Tórshavn, har tað regluliga luttekur. Men kórið hevur givið mongum øðrum - bæði her á landi og uttanlands - gleðina av at hoyra teirra vakra sang. Men nú vil Ebenezerkórið fegið røkka inn í hvørt heim við sama endamáli: At bera gleðiboðskapin um Jesus Kristus fram í kórsangi og tónleiki. Fleiri aðrir virknir bólkar eru sprotnir úr kórinum, og vit fáa ta fragd at hoyra Dupultkvartettina, Triple Trio og tey á Váli."

Kórið syngur eisini við mong ymisk høvi og ferðast eisini við sangi sínum kring oyggjarnar og hevur eisini verið fleiri ferðir uttanlands.

Nevnast kann at kórið hevur verið nakrar ferðir í Onglandi og Skotlandi hesi seinnu árini, har føroyski kórsangurin er sera væl umtóktur. Tey hava eisini fleiri enskar sangir á skránni.

Ebenezerkórið, sum annars er sera virkið, hevur kortini ikki gjørt nógv við útgávu-virksemi. Tað eru meira enn 40 ár síðan síðstu útgávu við Ebenezerkórinum.

Í 1960 var tað plátuforlagið Hørputónar hjá Radio El í Havn sum gav út eina single plátu, nevnd: Sangkór Ebenezers - Vit syngja kór.

Sangupptøkurnar á nýggju fløguni eru gjørdar í Útvarpi Føroya, meðan tónleikur og ljóðbland er gjørt í EvR Studio. Evangeliska Røddin er útgevari.

Saman við nýggju fløguni liggur teksthefti, har sangirnir eisini eru týddir til enskt, við nágreiniligari frágreiðing um innihaldið og við einum boðskapi á føroyskum og enskum.

Nýggja fløgan er sera fjølbroytt. Kórið syngur bæði við og uttan fylgispæli. Inn í millum eru so sangirnir hjá Triple Trio, Dupultkvartettini og teimum á Váli. Tey sum syngja einrødd eru: Brita á Váli Smith, Anna D. Háberg, Charlotta á Váli Olsen, Gunnrið Simonsen, Jens Andreassen og Jóhannes Poulsen. Jóannes á Váli og Ólavur á Váli syngja einrødd og eisini tvírødd.

Jens Kristian Guttesen er kórleiðari hjá Ebenezerkórinum.

Nýggja fløgan, sum kostar 169 kr., er komin í handlarnar.

# JÓLABLAÐIÐ

# Reytt og grønt eru litirnir

**Jólaprýði kann vera so nógv. Nissur, perur og lutir av ymsum slagi. Men ikki kann komast rundan um blómur, gran og kertuljós, sum so avgjørt seta sín dám á hugnaligu tíðina í desember. Og serliga litirnir reytt og grønt verða nógv nýttir til prýðis**

JÓL

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Blómuhandlarnir eins og aðrir handlar kring landið hava úr at gera hesa ársins tíð. Fólk keypa nógv til prýðis – eins og fyritøkur, virki og stovnar somuleiðis bíleggja jólaprýði. Øll vilja hava tað jólaligt hjá sær sjálvum. Og fleiri nýta blómur sum eina jólaheilsan til familju ella vinir. Eitt nú ístaðin fyri jólakort.

– Tað eru rættiliga mong, sum nýta høvi til at senda einum kærum eitthvørt vakurt blómutyssi ella samanplantning við eini heilsu um gleðilig jól, sigur Anna Vang, sum er eitt av teimum seks starvsfólkunum í blómuhandlinum Árstíðirnar.

Hon greiðir frá, at tey byrja at merkja jólaresið í endanum av november, og so heldur tað áfram líka til jólaaftan.

Men hon sigur, at hetta er ein sjarmerandi tíð, har øll vilja fríðka um hjá sær sjálvum, og tað tí kann vera spennandi hjá teimum at menna teirra egnu skapandi evni.

## Litir

Litir hava nógv at siga fyri árstíðir. Um onkur hongdi gult upp á jólum, so hevði tað helst vakt undran millum fólk. Ann sigur, at tað eru teir somu litirnir, sum ganga aftur hvørt ár.

– Reytt og grønt, tað er altíð. Men so er tað krem eisini. Og gull og silvur sjálvandi. Summi vilja hava alt at passa saman, so tey keypa alt í somu litum, meðan onnur eru meira til eitt sindur av hvørjum, sigur hon.

Grann verður altíð nógv nýtt til jóla. Nógvar jóladekoratiónir verða gjørdar í blómuhandlum gjøgnum jólamánaðin. Og so eru tað sjálvandi eisini tey, sum keypa tilfarið úr handlinum, men gera tær sjálvi.



*Jóladekoratiónirnar verða framvegis gjørdar, hóast komið er út ímóti hálvum desember*

*Mynd: Jens K. Vang*

## Fáir kransar

Ein siður, sum var nógv nýttur fyri nøkrum árum síðani, er adventskransurin. Men Ann sigur, at teir verða ikki nógv nýttir longur.

– Stjórin hjá mær sigur, at tað vóru rættuliga nógvir adventskransar, áðrenn kreppuna í níti árunum, men so kom hon, og fólk høvdu ikki ráð. Og tað letur ikki til, at kransarnir vinda upp á seg aftur, sigur hon. Men tað er so nógv annað prýði at fáa í dag, at tað ikki er so løgið, at kransarnir ikki verða so nógv umbidnir longur.

Men grannið er sum sagt har kortini – bæði í jólatrænum og í dekoratiónunum. Aðrar blómur og plantur, sum eru væl umtóktar um jólini eru jólastjørnan, jólarósan, hyacintir, tulipanir og eitt sum eitur amaryllis. Tað er ein avbera vøkur jólaplanta við flottum, reyðum blómum.

Ann sigur, at handilin sjálvur ikki er so nógv prýddur enn, men nú fara tær at byrja av álvara. Fyri gestsins eyga sær tað bara heilt jólaligt út í hugnaliga handlinum við øllum teimum vøkru blómunum í alskyns litum, perum og grankoglum í gløsum.

– Nú eru vit við at koma í rættlag við øllum, so nú fara vit at royna at vera eitt sindur kreativar og finna upp á okkurt sjálvar, sum kann prýða handilin meira til høgtíðina, sigur hon at enda.